**Betri vinir**

# Hjálp barni tínum at fáa góð vinaløg

## Góðu foreldur

Børn hava tørv á góðum vinum fyri at trívast og mennast. Tá ið børn læra, hvussu tey kunnu vera góðir vinir, fyribyrgja vit samstundis happing sum frá líður.

Tað er ein vanlig fatan, at orsøkin, at barn títt verður happað, finst hjá barninum sjálvum ella hjá tí, ið happar. Men gransking vísir, at happing ikki fer fram, grundað á einstøk børn, men tí at tað ikki er pláss fyri at vera øðrvísi í bólkinum við børnum.

Í einum góðum felagsskapi við børnum, er tolsemið og virðingin fyri hvør øðrum so stór, at børnini kunnu síggja út, eita og vera júst soleiðis, sum tey eru, og í einum góðum felagsskapi duga børnini at síggja, at øll kunnu koma við sínum íkasti til felagsskapin.

Góði felagsskapurin hjá børnunum hjálpir øllum børnum at trívast, og ein góður felagsskapur klárar at standa ímóti happing. Tí gert tú barni tínum væl, tá ið tú gert okkurt fyri felagsskapin.

Sum foreldur hevur tú ein týdningarmiklan leiklut sum vegleiðari og fyrimynd í sosiala lívinum hjá barni tínum. Tá ið tú stuðlar samanhaldinum og felagsskapinum hjá børnunum, og samstundis stuðlar barni tínum í at vísa umsorgan og vera djarvt og siga frá, tá ið hon ella hann sær børn verða útihýst og arga, gert tú mun í fyribyrgingini av happing.

Betri vinir hevur savnað sjey góð ráð, hvussu tú sum foreldur kanst vera við til at tryggja, at øll børn – eisini títt – verður ein partur av felagsskapinum. Les tey á baksíðuni.

Vinaliga
BETRI VINIR



**Soleiðis hjálpir tú barni tínum at vera ein góður vinur – les meira á baksíðuni**

## Um BETRI VINIR

Betri vinir er ein fyribyrgjandi verkætlan ímóti happing, ið Mary Fonden og Red Barnet hava gjørt.
Betri vinir byggir á fýra grundleggjandi virðir: tolsemi, virðing, umsorgan og dirvi, ið inniheldur eitt kuffert og eitt talgilt univers, ið rúmar amboðum og arbeiðsháttum, ið geva sítt íkast til trivnað og fyribyrging av happing í innskúling og í frítíðarskúlanum.
Betri vinir finst eisini í eini útgávu til vøggustovu/dagrøkt og barnagarð.
Les meira á **www.betrivinir.fo.**

Mary Fonden H.K.H. Kronprinsesse Marys Fond · Red Barnet · barnabati · NÁM · BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ Ministry of Children and Education

# Betri vinir

## Sjey ráð til foreldur

**1** Eggja barni tínum at spæla við ymisk børn, bæði í skúlanum og í frítíðini.
Tað styrkir og fyribyrgir happing í felagsskapinum hjá børnunum, tá ið tey kenna hvønn annan tvørtur um flokk og aldur. Tá ið tú leggur eyka orku í at gera avtalur við øll – eisini tey, sum barn títt ikki plagar at spæla við – so ert tú við til at tryggja, at øll børn fáa eitt pláss í felagsskapinum.

**2** Tosa pent um og við onnur børn, foreldur teirra og um starvsfólkini.
Børnini gera sum foreldrini, og um tú er jalig/ur, tá ið talan er um skúla, starvsfólkini, vinirnar og foreldur teirra, so fer barn títt eisini at verða tað. Sig t.d. hey við øll – bæði børn og vaksin – tá ið tú kemur við og eftir barni tínum, og lær teg nøvnini hjá vinunum.

**3** Skipa fyri felagstiltøkum fyri øll.
Føðingardagar hava nógv at siga fyri børnunum. Tað er skuffandi hjá tí barni, sum ikki verður bjóðað við, og hjá tí barni, sum ikki fær nakrar føðingardagsgestir. Leggið orku í at bjóða øllum flokkinum – ella allar gentur ella allar dreingir – tá ið tit halda føðingardag ella hava onnur tiltøk, og berið so í bandi, at barn tykkara kann fara, tá ið onnur bjóða.

**4** Hjálp barni tínum at bera seg rætt at, um ein vinur er fyri onkrum órættvísum.
Børn, sum ikki eru partur av barnahópinum, hava brúk fyri einum sindri av hjálp frá einum vini. Børn, ið hjálpa, troysta og verja onnur, merkja, at tey verða errin av hesum.

**5** Vís áhuga fyri talgilda lívinum hjá barni tínum.
Børn vita, hvussu tey skulu bera seg at við miðlum, men skilja teir ikki altíð. Tí tørvar teimum vegleiðing frá teimum vaksnu. Ver forvitin og spæl við – og tosa við barn títt um, hvussu vit eisini í talgilda heiminum skulu vísa fyrilit fyri øðrum.

**6** Spyr barn títt, um okkurt er, sum ger tað tungt í huga.
Viðurkenn kenslurnar hjá barni tínum, men minst eisini til, at tað eru fleiri síður av somu søk. Hjálp barni tínum at hugsa, um onnur børn kanska hava upplivað ta somu ósemjuna øðrvísi, og tosa kanska við onnur foreldur, ein lærara ella pedagog, áðrenn tú gert nakað viðvíkjandi eini ósemju.

**7** Ver opin og jalig/ur, um onnur fortelja tær um avbjóðingar hjá sínum barni.
Tað kann vera torført at fortelja øðrum, at eins barn hevur trupulleikar í skúlanum og tí t.d. tørvar eyka hjálp. Tað er lættari, um onnur foreldur lurta eftir.

Mary Fonden H.K.H. Kronprinsesse Marys Fond
Red Barnet
barnabati
NÁM
BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Children and Education